Leygarkvøldið kl. 22,20:

Ein dreymur gerst veruleiki 1(5)

Tá du Coubertin, barónur í Fraklandi, fekk hugskotið at endurstovna olympisku leikirnar, var tað fyri at styrkja altjóða sambandið. Kortini hevði hann torført við at fáa stuðul fyri síni ætlan. Hann gekk nærum biddaragongd til stjórnarliðarar í ymsu stóru londunum, og bert fáir teirra, góvu honum ans. Har stjórnarleiðarar ikki stuðlaðu baróninum, fór hann til aðrar persónar, sum fólk høvdu álit á. Hetta vóru lærarar við hægri lærustovnar, ítróttarfólk og fólk, sum høvdu áhuga fyri ítrótti. Tað eydnaðist eftir tógvið stríð at endurstovna fyrstu olympisku leikirnar í Athen 1896.

Amerikanska sendirøðin »Ein dreymur gerst veruleiki«, snýr seg í innihaldi um trupulleikarnar hjá du Coubertin at skipa olympisku leikarnar og at vekja áhugan hjá røttu persónunum fyri tiltakinum, eins og at finna ítróttarfólk, sum skuldu kappast í teim 12 ymsu ítróttargreinunum.

Ein teirra, sum við eldhuga stuðlaði bárónin, var William Sloane, doktari, sum var lærari við Princeton-universitetið í USA. Tað eydnaðist honum at fáa 13 ungar menn at iðka renning og spjótkasting. Tá egni lærustovnur hansara ikki vildi lata ítróttarfólkunum innivist, eydnaðist tað á øðrum skúla, har venjingin fór fram.

Samstundis vandi ein grikskur seyðamaður — uttan at vita av hesum — marathonrenning. Hann var hermaður í lotuni, men eisini ástartolom av gentu í bygd nærindis. Hann rann millum hernaðarbúðina og býlingin hvørt kvøld, at hitta gentuna. Hetta var venjing hansara til fyrstu olympisku leikirnar, og er bert eitt dømi um, hvussu tilvildarliga tað byrjaði, sum í dag er heimsumfevnandi fyritaksemi, ið olympisku leikirnir í dag mynda seg.

sjónvarp

Leygardagin 4. august

13.00 **OL**
19.30 **Tom Sawyer og Hucleberry Finn 1(13)**
20.15 **Spenningur í Singaporte**
21.05 **Síðstu buskmenninir**
21.30 **Kim Larsen**
22.20 **Ein dreymur gerst veruleiki 1(5)**
23.10 **Hetta er ikki TV-avisin**
23.35 **Liðugt**

Sunnudagin 5. august

15.00 **Sibelius: 1. symfoni**
15.40 **Guðstænasta**
19.30 **7 stuttar søgur um kærleika**
20.35 **Søgan um Chaim Rawkowsky**
21.30 **Otto Leisner**
22.20 **Agatha Christie**
23.00 **Andakt**
23.05 **Liðugt**

Leygardagin kl. 20.15

Tom Sawyer og Huckleberry Finn 1 (13)

Hetta er sendirøð um kendar persónar hjá Mark Twain. Mark Twain hevði skiftandi umstøður á barnadøgum sínum, og tá hann vaks til, royndi hann nógv ymisk størv. Hann var loðsur á Missisippi, prentari, gullgravari og landastrok, — eisini blaðmaður og rithøvundur. »Tom Sawyer« og »Hucleberry Finn« bøkurnar eru skrivaðar í 1876 og 1884.

Sendingin er um teir báðar Tom og Huck. Teir eru vinir og ikki til at skilja sundur, men kortini eru teir ógvuliga ólíkir. Huck er egin og ger hvat honum fellur í huga. Hann er tó ógvuliga veruligur í síni hugsan, og tí virðismetir hann Tom, sum hevur so nógv at siga frá, ið hann hevur lisið um í bókum innan søgu og skaldskap. Tom harafturímóti hevur virðing fyri Huck, tí hann er so óbundin og ikki letur sær lynda, annað enn tað hann sjálvur vil.

Í byrjanini á sendirøðini, sum vit skulu síggja í kvøld, hevur Tom góðar dagar. Polly tanta, fangar Tom í at stjala súltutoy, hann og Huck skulka í skúlanum, teir berjast og Tom gabbar um, at hann vinnur á hálvbeiggja sínum Sid. Teir lata eina bibliu sum vinning til tann, sum smyr hann av.

Polly tanta, verður greið yvir veddingina, og hon revsar Tom og gevur honum boð um at mála rimagarðin. Hóast hetta, so fær Tom nógv skemt burturúr og eisini fær hann onnur at gera arbeiðið fyri seg.

Í hesi sendingini hittir Tom fyrstu ferð Becky, sum fær týdning fyri Tom, eins og vit fáa at vita, hvussu gongst í Bíbliu-kappingini.

Spenningur í Singapore

Hetta er sendirøð um Frank Buck, kenda veiðimannin, sum fangaði dýr til djóragarðar kring um í heiminum. Hann førdi dýrini óskalað til ávísu plássini, og hann nýtti ikki skambyrsuna, uttan so at hann kendi seg í vanda. Í 30 ár, frá 1. og fram til byrjanina á 2. heimsbardaga, gjørdist hann víða kendur fyri arbeiði sítt. Frásagnir um Frank Buck hava verið varðveittar gjøgnum filmar, fyrilestrar, útvarpssendingar og djóraframsýningar og bøkur, sum hann skrivaði um ferðir sínar.

Frank Buck doyði 66 ára gamal í 1950. Størsta partin av lívi sínum ferðaðist hann soleiðis í Asia, Malaya, India, Borneo og New Guinea. Høvuðsstøð hansara var í Singapore, har hann oftast var at hitta á Raffles Hotel, hiðani útferðir hansara gingu.

Í fyrsta parti í sendirøðini verður Frank Buck at siggja í frumskóginum og á gistingarhúsinum í Singapore. Hann verður vavdur inn í eitt politiskt spæl. Amerikanski varakonsulin hevur fingið upplýsing um, at ein njósnari smuglar inn loynilig skjøl um ætlanir hjá japanarum, at gera innrás í Malaya.